# Tiknir upp á Jotumfeltinum

**Vatn kom í brennievnið á skutaranum hjá Alta S. Petersen, og tí bóðu teir um hjálp og sigldu til lands seinastu 80 fjórðingarnar við einum veitingarskipi. Ferðin heldur tó fram til Keypmannahavnar**

SKUTARAFERÐIN
*Eirikur Lindenskov*

Royndin hjá teimum báðum, 26 ára gamla Sveini Høgnason og 31 ára gamla Atla S. Petersen, endaði fyribils umborð á einum veitingarskipi á Jotum oljufeltinum í Norðsjónum 80 fjórðingar úr Stavanger.

– Tað var eg sum fekk trupulleikar við mínum skutara. Annaðhvørt er vatn komið í luftinntakið ella í brennievnið, sigur Atli S. Petersen, tá vit hittu hann í fartelefonini úr Stavanger fyrrapartin týsdagin.

Teir báðir, Atli S. Petersen og Sveinur Høgnason vóru komnir meiri enn hálva leið úr Hetlandi til Noregs, tá skutarin hjá Atla fór at ganga so illa. Motorurin steðgaði ongantíð – og tað skuldi hann helst ikki gera, tí skutarin kann ikki sleipast, tí tá tekur maskinan vatn inn. Teir vendu tí aftur til ein veitingarbát, ið lá á Jotum oljufeltinum einar 80 fjórðingar úr Stavanger og bóðu um hjálp. Har vórðu skutararnir tiknir umborð.

Tá teir hivaðu skutaran hjá Atla umborð, brotnaði ein partur av róðrinum, og tað er hendan eykalutin, teir nú vóru í ferð við at umvæla í Stavanger.

Annars gekk túrurin tvørtur um Norðsjógvin ikki heilt, sum ætlað, sigur Atli S. Petersen.

– Vit høvdu fingið lova nóg mikið av brennievni frá einum veitingarbáti á vegnum, áðrenn vit fóru úr Hetlandi, men vit fingu bert 40 litrar í part, og tað var ikki nóg mikið, greiðir Atli frá. Hann sigur, at á túrinum úr Føroyum til Hetlands brúktu teir 200 litrar í part – teir kunnu hava 250 litrar umborð í part, og tað vildu teir hava til túrin til Noregs. Teir høvdu eisini góðar veðurvánir, tá teir fóru, men veðrið var ikki so gott, sum roknað var við, hóast vandi ongantíð var á ferð, sigur Atli S. Petersen.

– Men vit hava havt tað fínt, og vit hava gott mót um at halda fram, sigur Atli, sum leggur dent á, at trygdin hjá teimum alla tíðina hevur verið í lagi.



*Atli S. Petersen fekk trupulleikar við skutara sínum á ferðini um Norðsjógvin. Vatn kom í brennievni, og tí bóðu teir um hjálp frá norska veitingarskipinum, Normand Master, sum sigldi teir síðsta strekkið til Stavanger*

## Rós frá bjargingartænastuni

– Fólk hava fílst á, hví vit ikki hava bát at fylgja okkum á ferðini. Men tað bera bara ikki til, og ein slíkur bátur kann so lítið gera. Tað ber ikki til at sleipa skutararnar, tí skulu teir umvælast, so mugu teir takast upp, og tá mást tú hava ein størri bát, sigur hann.

– Vit fingu eisini rós frá vaktar- og bjargingartænastuni í Hetlandi, tí vit vóru so væl útgjørdir við trygdarútgerð. Teir søgdu, at tað koma so nógvir bátar handanvegin, sum eru illa útgjørdir, og so koma vit á tveimum vatnskutarum við góðari trygdarútgerð, greiðir Atli S. Petersen frá.

– Vit hava hava ein bjargingarbát til fýra, vit hava tríggjar GPS'arar, hóast vit bara hava brúk fyri einum, vit hava VHF'ara og satelittelefon eins og eina ørgrynnu av neyðrakettum og blussum, greiðir hann frá.

Alti sigur, at teir eru imponeraðir av, hvussu væl teir kropsliga hava megnað túrin.

– Vit høvdu væntað tað nógv verri. Tá vit komu til Hetlands vóru vit nokkso eymir, men eftir hvíldina høvdu vit tað nógv betur. Nú merkja vit tað sjálvandi á kroppinum, men tað eru í so máta eingir trupulleikar at halda leiðina fram.

## Fjølmiðlar stóran áhuga

Tað er eyðsæð, at fjølmiðlarnir hava áhuga í slíkum váðaferðum, sum hendan hjá Atla og Sveini.

Atli S. Peteresen sigur, at telefonin hevur gingið heit, so nógvir miðlar vilja hava orðið á teir. Tá Sosialinurin hitti teir týsmorgunin, høvdu teir tosað við BBC, bretsk og skotsk bløð, við norska sjónvarpið, VG og donsk bløð. Atli heldur, at tað eru føroysku miðlarnir, ið hava víst tiltakinum minstan áhuga.

Tá vit hittu Alta, vóru teir í ferð við at umvæla skutaran. Hann væntaði, at hann fór at verða klárur einaferð seinnapartin týsdagin, men teir fara í fyrsta lagi avstað úr Noreg í fyrrapartin í mikudag.

– Vit eru komnir gjøgnum tað ringasta farvatnið, so tað skal ikki tarna okkum nú, sigur Atli S. Petersen, sum væntar at klára síðsta triðinging upp á ein dag – kanska í kvøld, um farið verður í dag, mikudag.






# Samgongan yvirlivdi sín seinasta kjans

**Í mars mánað setti Tjóðveldisflokkurin fram 6 treytir, ið skuldu lúkast, um samgongusamstarvið skuldi halda fram. Nú verður nýggjur mentamálaráðharri settur, og samgongan rullar eftir øllum at døma víðari. Men hvussu stendur til við teimum 6 treytunum**

SEINASTI KJANSUR
*Rúnar Reistrup*

- Samgongan fær ein seinasta kjans, ein absolutt seinasta kjans. So kontant vóru boðini frá Høgna Hoydal, formanni Tjóðveldisfloksins, til sínar samgongufelagar, tá higartil seinasta álvarsama samstarvskreppan hjá sitandi samgongu fekk ein fyribils enda mitt í mars mánaði í ár.

Samgongukreppan stóðst, sum flestum kunnugt av, at løgmaður loysti táverandi mentamálaráðharra Annlis Bjarkhamar úr starvi, uttan at Tjóðveldisflokkurin var eftirspurdur.

Almenna orsøkin til at Annlis Bjarkhamar fekk sekkin, var handfaring mentamálaráðharrans av setanini av nýggjum landsantikvari, sum løgmaður ikki var heilt nøgdur við. Formaður Tjóðveldisfloksins var alt annað enn fegin um ta viðferð, sum løgmaður gav floksfelaganum, og fór undir at umhugsa støðu samgongunnar gjølla.

Eftir óvissu í longri tíð um samgongan fór at bera ella bresta, høvdu samgongufloksarnir ein (sjáldsaman) tíðindafund, har formaður Tjóðveldisfloksins gav samgonguni sín absolutt seinasta kjans og setti ein talmerktan lista við 6 treytum, sum skuldu lúkast, um samgongusamstarvið skuldi halda fram. Sambært formanninum í størsta samgonguflokkinum, var orsøkin til kreppustøðuna meira enn bara einstaka málið um Annlis Bjarkhamar. Hetta var ein dropi í bikarinum, sum nú var um at flóta yvir.



*- ein seinasta kjans, ein absolutt seinasta kjans*

## Bikarið tómt

Í vikuni boðaði Høgni Hoydal frá, at nú fer Tjóðveldisflokkurin undir at finna nýtt fólk til mentamálaráðharrasessin. Merkir tað so eisini, at samgongan yvirlivdi sín seinasta kjans, at vatnstøðan í bikarinum er lækkað, at allar tær 6 talmerktu treytirnar eru loknar, og at Tjóðveldisflokkurin er blíðkaður aftur?

- Nei hatta havi eg onga viðmerking til. Vit gera okkum í heilum metingar um hvussu er statt við samgongusamstarvinum, men vit fara ikki út í fjølmiðlarnar at diskutera innanhýsis viðurskifti, svarar Høgni Hoydal.

Svarið er í tráð við avgerðina hjá Tjóðveldisflokkinum um at halda innanhýsis mál innanhýsis. Men greiða má fáast á, um tey 6 treytirnar eru loknar, nú nýggjur mentamálaráðharri eftir øllum at døma verður settur, so vit byrja í einum enda.

**1. treyt: Samstarvslag broytast munandi:**
Tað fyrsta sum má fáast skil á, er sjálvt samstarvslagið og javnvágin millum flokkarnar, vóru boðini í mars. Er skil komið á samstarvslagið hjá samgonguni?

- Tað er einki at fjala útyvir, at tónin enn er rættiliga merktur av at flokkarnir ikki eru so samdir. Til dømis var tónin undir kjakinum um løgmansrøðuna ikki serliga penur. Men tónin er ikki so umráðandi um politiska arbeiðið annars virkar sum tað skal. Og tað ger tað stórt sæð, sigur Høgni Hoydal, sum ikki dylur fyri, at Tjóðveldisflokkurin hevur bíðað eftir avgerð fiskimálaráðharrans um Jógvan S málið, áðrenn flokkurin fór undir at hyggja sær eftir einum nýggjum mentamálaráðharra.

- Nú er tað málið loyst, og vit eru nøgd við úrskurðin, sigur formaður Tjóðveldisfloksins, sum tó noyðist at viðganga, at tað enn haltar eitt sindur við samstarvslagnum sum heild..

**2. treyt: Fullveldiskósin aftur á beint:**
Fullveldiskósin, sum hevur havt ilt við at fylgja kumpassini eftir farna val og nakað frammanundan, skuldi sambært krøvunum í mars aftur á beint, um samgongusamstarvið skuldi halda fram.
Høgni Hoydal er rættiliga væl nøgdur við gongdina á hesum øki.
- Allar tær treytirnar, sum vit tá settu, vóru í veruleikanum beindar ímóti at fáa burtur allar forðingar fyri einari fólkaatkvøðu um føroyskt fullveldi, sum jú er tað yvirornaða málið hjá Tjóðveldisflokkinum. Nú haldi eg at vit kunnu siga, at flestu forðingar hesum viðvíkjandi eru burtur.

**3. treyt: Uppruddin í fiskivinnupolitikkinum:**
Fiskivinnupolitikkurin hevur verið ein av teimum vígvøllunum, har harðastu samanbrestirnir samgonguflokkarnar ímillum hava verið. Jørgen Niclasen er fallin, og eftirmaður hansara fekk knívin á barkan frá Tjóðveldisflokkinum í sambandi við Jógvan S málið.

Høgni Hoydal sigur seg nú hava fult álit á, at sitandi fiskimálaráðharri, Jacob Vestergaard fer at halda fram við uppruddingararbeiði sínum í fiskivinnureglunum.

**4. treyt: Íløgur í skúlar fremjast:**
- Tað hava vit fingið ígjøgnum, sigur Høgni Hoydal í viðmerking til fjórðu treytina.

**5. treyt: Sosialmálini fremjast:**
- Hatta er eisini fingið upp á pláss.

**6. treyt: Almenni bygnaðurin endurskoðast og økismenning:**
- Hetta er ikki komið upp á pláss enn, men vit hava álit á, at tað fer koma í rættlag, sigur Høgni Hoydal í viðmerking til ta seinastu av teimum 6 treytunum, hann sjálvur setti fram, tá samgongan sá út til at vera bjargað í seinastu løtu fyri smáum fimm mánaðum síðan.

## Óslætt fyri framman

Fýra og ein hálv treyt kunnu soleiðis siga at vera uppfyltar, og av seks er tað ikki so lítið. Sjálvur er formaður Tjóðveldisfloksins rættiliga væl nøgdur við gongdina seinastu fimm mánaðirnar.

- Vit ímyndaðu okkum ikki, at alt fór at fella fullkomiliga upp á pláss eftir so stuttari tíð, men eg haldi at vit kunnu siga, at tað eru hend framstig, síðan støðuna tá. Men alt er langt frá komið í rættlag. Tá snúði ónøgdin seg serliga um at Annlis Bjarkhamar varð koyrd frá uttan nakra góða grund, og vit vita enn ikki, hví hon varð koyrd frá, sigur Høgni Hoydal.

Men hann læt tað fara framvið borðinum tá, og tað skal heldur ikki skaða samgongusamstarvið nú ella í framtíðini. Tað málið er, sum fleiri aðrar samgonguósemjur, goymt, men ikki gloymt.

At nýggjur mentamálaráðharri verður settur nú er eitt tekin um at seinasta stóra kreppa er riðin av, men sambært Høgna Hoydal hevði tað verið optimistisk at roknað við einum friðarligum restandi valskeiði.

- Vit eru komin um nakrar boðar og nøkur sker. Men vit rokna ikki við at tað liggur sléttur sjógvur fyri framman.

# Leita eftir nýggjum mentamálaráðharra

**Í hesi vikuni byrjar Tjóðveldisflokkurin at leita eftir nýggjum mentamálaráðharra fyri Annlis Bjarkhamar, sum varð loyst úr starvi fyri skjótt hálvum ári síðan.**

RÁÐHARRALOYSI
*Rúnar Reistrup*

- Tað eru altíð nógv góð boð í Tjóðveldisflokkinum, sigur Høgni Hoydal, spurdur um hvør er í hansara kikara, nú hann er farin at leita eftir nýggjum manni ella nýggjari kvinnu at seta í mentamálaráðharrasessin, har hann sjálvur hevur sitið hálvur seinasta hálva árið.

Longu beint eftir at løgmaður av sínum eintingum gav Annlis Bjarkhamar tað gylta lógvatakið í mars mánað, segði Høgni Hoydal, formaður Tjóðveldisfloksins, at eingin nýggjur mentamálaráðharri fór at verða settur fyrr enn eftir ólavsøku. Til tað var politiska støðan ov óstøðug.

Í farnu viku kom leingi væntaða avgerðin um Jógvan S málið, og hon letur til at hava verið tann seinasta óstøðuga vektin á samgonguvágskálini, tí stutt eftir kom alment fram, at Tjóðveldisflokkurin fer at seta nýggjan mentamálaráðharra í næstum.

Høgni Hoydal vil ikki seta nakra tíðarfreist á, men longu í hesi vikuni kemur aðalstjórn floksins saman við tingbólkinum at viðgera málið, so tað er ikki óhugsandi, at eitt navn verður nevnt, áðrenn hesin mánaðurin er liðin.